Ferðsluóhapp:

Skaðar á høvd og kropp

LØGREGLUTÍÐINDI
Ingrid Bjarnastein

Leygarmorgunin koyrdi ein 19 ára gamal drongur útav millum Gamla Enda og Lambafellið. Drongurin var á veg norðureftir, tá óhappið hendi. Hann varð slongdur út úr bilinum, og lá á vegnum við síðuna av bilinum, tá løgreglan kom á staðið.

– Førarin hevði mist tamarhald á bilinum, og hevði koyrt yvir í hina síðuna á vegnum, har hann síðani er farin útav, sigur vakthavandi á politistøðini í Havn.

Drongurin hevur helst ligið leingi áðrenn óhappið er fráboðað, tí bilurin var kaldur, og tað var hann eisini. Hann hevði fingið smærri skaðar á høvd og kropp.

Politiið sigur, at tað er onki sum bendir á, at talan er um spirituskoyring.

Spirituskoyring:

Rendi á parkeraðar bilar

LØGREGLUTÍÐINDI
Ingrid Bjarnastein

Um átta tíðina fríggjakvøldið fekk politiið í Havn fráboðan um, at ein kona hevði rent á nakrar parkeraðar bilar uppi á Oyggjarvegnum.

Konan, ið ætlaði sær norðeftir, broytti meining og fór suðureftir aftur. Hon rendi á ein bil, og skumpaði í ein annan. Síðani stakk hon av. Politiið fann konuna aftur í býnum, og hon verður skuldsett fyri spirituskoyring.

Herverk í SMS

LØGREGLUTÍÐINDI
Ingrid Bjarnastein

Sunnumorgunin fekk løgreglan í Havn fráboðan, at herverk var gjørt á millumbygningin í SMS. Talan var um tveir knústar duplult glasrútar. Hol var ígjøgnum annan rútin, meðan hin var sprekkaður. Helst eru tað steinar, ið eru kastaðir á rútarnar.

Løgreglan veit ikki, hvør gerningsmaðurin er.

Annars verður sagt av politigarðinum í Havn, at hampuliga friðarligt hevur verið um vikuskiftið.

Onkur smáherverk, og eisini hevði onkur fingið húsini hjá sær maksað út.

Og hóast stóru undirtøkuna á Ovastevnuni í ár, hevði løgreglan onki at gera har úti. Ongin var sendur til Nólsoyar, tí løgreglan hevði ikki manning til tess, men tað var lukkutíð, heldur ikki tørvur á løgregluni úti í Nólsoy um vikuskiftið.

Vakthavandi á politistøðini sigur tó, at um tørvur hevði verið á løgregluhjálp úti í Nólsoy, plagar Skipasmiðjan at sigla manninar út við skúmaranum.

Barnaprix 2002:

Her eru okkara framtíðar sangarar

Fyrsta innleiðandi umfar til Nósa Barnaprix 2002 var í Badmintonhøllini í Havn um vikuskiftið

Mynd: Álvur Haraldsen

Fyrsta innleiðandi umfar í Nósa Barnaprixnum fór av bakkastokki leygarkvøldið. Badmintonhøllin í Havn var karmur um fyrsta umfarið, sum fyrireikararnir eru stak væl nøgdir við

TÓNLEIKUR
Ingrid Bjarnastein

Undirtøkan til Nósa Barnaprix 2002 hevur verið ógvuliga góð. Barnaprixið er fyri børn, sum eru millum 7 og 14 ár, og er hetta fyrsta ferðin eitt barnaprix er á skránni her á landi.

Fyrsta umfar av teimum sjey innleiðandi var í Badmintonhøllini leygarkvøldið.

Heilt fitt av fólki var møtt upp, men siga fyrireikararnir, at tað væl kundu verið meira.

– Nú var veðrið so gott og Ovastevna var í Nólsoy, so tað kann vera tað, sum eisini hevur spælt inn, sigur Mark Joensen, sum er ein av fyrireikarunum til Barnaprixið.

– Men vit eru stak væl nøgdir við gongdina. Børnini dugdu ógvuliga væl at syngja, og eg varð ógvuliga ovfarin av teimum. Her eru púra vist nakrir av okkara framtíðar sangarum.

James og Angela vóru frásøgufólk í Badmintonhøllini, og hetta megnaðu tey væl.

Tó vóru summi hørm um, at atgongumerki kostaði 100 krónur, men hinvegin vistu tey ikki, at børn undir skúlaaldur sluppu ókeypis inn, skrivar pop.fo millum annað.

– Vit høvdu tíverri ikki gjørt hetta greitt fyri fólki, men tað ætla vit at bøta um. Til næstu kapping fara vit eisini at gera eitt serligt familjuatgongumerki, so tær ikki skulu gjalda so nógv fyri tiltakið, sigur Mark Joensen við pop.fo

Og í fyrsta umfarinum var fyrsti vinnarin sjálvandi eisini kosin. Tað gjørdist 13 ára gamli Bjarki Hansen av Argjum. Kappingin var sera hørð og spennandi, og var hann bara nøkur fá stig frammanfyri Kristel Lisberg.

Næsta innleiðandi umfar verður á Kambsdali í ítróttarhøllini komandi vikuskifti. Atgongumerki fáast longu í forsølu á Kunningarstovuni í Runavík og í Shell-støðunum í Eysturoynni.

Suðuroyingar fingu grind

LØGREGLUTÍÐINDI
Ingrid Bjarnastein

Kring landið hevur verið friðarligt um vikuskiftið. Tað upplýsa tær ymsu politistøðirnar kring landið.

Politistøðin við Sandin í Klaksvík sigur, at har norðuri hevur stórt sæð verið friðarligt. Herverk var tó gjørt á ein gamlan bil, og noyddist løgreglan í Klaksvík eisini inn í eini hús at blaka ein fullan mann út.

Í Eysturoynni hevur eisini verið friðarligt. Onkur varð tikin fyri ferð, okkurt smávegis ferðsluóhapp og eisini vóru nakrir tiknir fyri spirituskoyring.

Grind í Hvalba

Sunnudagin var grind í Hvalba. Talan var um 89 hvalir, sum samanlagt góvu 492 skinn.

Grindin gjørdi ikki landgongd, og drápið vardi í 20 minuttir. Og eitt korter áðrenn klokkan fýra var liðugt.

Upplýst verður av politistøðini á Tvøroyri, at nógv av fólki var við til drápið.

Grindin varð býtt út til alla oynna. 5186 partar skuldu suðuroyingar tilsamans deilast um.

Fólkaflokkurin:

Vil neyvan hava SVF á fíggjarlógina

– Vit ivast stórliga, um tað er rætt at játta pening til SVF á fíggjarlógini, og er neyðugt við 70 milliónum til stovnin fyri at liva upp til endamálið, so má bera til at broyta endamálið soleiðis at peningatørvurin minkar, sigur Óli Breckmann, formaður í tingbólki Fólkaflokksins

SVF
Jústinus Leivsson Eidesgaard

Óli Breckmann húsligur á Gamla Apotekinum

Mynd: Álvur Haraldsen

Fólkaflokkurin er slett ikki heitur fyri at Sjónvarp Føroya kemur á fíggjarlógina og Óli Breckmann, formaður í tingbólkinum hjá Fólkaflokkinum sigur, at tinglimir flokksins eru meira enn ivasamir í um tað er rætt, at Sjónvarpið kemur á fíggjarlógina.

Mikkjal Helmsdal, sjónvarpsstjóri er komin fram við, at um endamálið hjá sjónvarpinum skal røkkast, at sent skal verða tað sama sum í dag, at alt tilfarið skal verða føroyskt ,og alt sum sent verður skal tekstast, so er kostnaðurin 70 milliónir krónur. Inntøkugrundarlagið hjá sjónvarpinum í dag er 23 milliónir krónur.

– Eg ivist stórliga í, um tað eru 70 milliónir í landskassanum at brúka til Svf. Um so er, so er nógv annað, sum hesin peningur kann nýtast til, millum annað at bera peningin aftur til skattgjaldaran, sum hevur goldið hesar 70 milliónir ov nógv í skatti, sigur Óli Breckmann

Endurskoða endamálið

– Vit í Fólkaflokkinum er meira enn ivingarsamir, um tað er rætt at koyra Svf á fíggjarlógina, og harvið fjerna alla kenslu hjá borgaranum av hvat sjónvarpið kostar.

Svf førir fram, at teir kunnu ikki liva upp til málsetningin, um teir ikki koma á fíggjarlógina. Og málsetningurin er settur politiskt av millumannað Fólkaflokkinum?

– Tað er rætt, men um so er, at málsetningurin ikki kann røkkast við verandi fíggjarkarmi, so má bera til at umdefinerað málsetningin politiskt, um so er at hann vísir seg at vera ov bjartskygdur, sigur Óli Breckmann.

Hvussu skal hann umdefinerast?

– Vit mugu finna heilt onnur konsept fyri hvussu vit gera sjónvarp í Føroyum. Tað eru ikki umstøður til at gera sjónvarp upp á allar dýrasta almenna mátan í Føroyum. sigur hann.

Tíðindaparturin av sjónvarpinum er dýrast parturin av rakstrinum. Er tað rætt, at sjónvarpið nýtir so nógv upp á tíðindaflutning?

– Nei, tíðindaflutningurin átti at kunna verið gjørdur á annan hátt aðrastaðni. Um sjónvarpið klárar seg so illa fyri 23 milliónir, so frestist eg at trúgva, at teir klára seg tríggjar ferðir verri við 70 milliónum.

Takk fyri seinast

Er støðan millum Fólkaflokkin og Sjónvarpið broytt nakað síðan uppgerðina millum løgmann og sjónvarpsstjóran í seinastu viku?

– Tað haldi eg ikki, at vit kunnu siga. Tú kann ikki føra ein politikk útfrá hvussu tú dámar ein tíðindaflutning, ella hvussu tær dámar innihaldið í einum stovni. Tú má brúka somu reglur fyri hvussu tú játtar ella ikki játtar til ein stovn sum sjónvarpið sum til aðrar stovnar, sigur hann

Støðan hjá fólkaflokkinum til um Svf skal koma á fíggjarlógina er ikki takk fyri seinasti í stríðið millum løgmann og sjónvarpsstjóran?

– Av gjørt ikki. Vit hava slett ikki broytt støðu yvirhøvir. Vit hava mælt til, at Svf klárar seg sjálvt fíggjarliga við teimum inntøkum, sum teir hava møguleika at vinna sær. Og at skattur í minst møguligan mun verður brúktur til at kamuflera tann veruliga kostnaðin av sjónvarpinum, sigur hann.

Tú hevur ofta fyrr verið rættuliga avgjørdur um almennar fjølmiðlar, skulu vit framhaldandi hava almennar fjølmiðlar?

– Um vit skulu hava fjølmiðlar, eitt landsútvarp og eitt landssjónvarp, so skulu vit í mest mun halda okkum til public servis funktiónin og síðan yvirláta undirhald, stuttleika og annað til onnur á sama øki.

– Vit í Fólkaflokkinum vilja í mest møguligan mun hava, at sjónvarpið kann liva av sínum egnu inntøkum, soleiðis at fólk føla hvat sjónvarpið kostar. Vit mugu gera okkum pínliga greitt, at tað ganga ikki nógv ár, fyrr enn fólk rinda fyri tá tey hyggja í sjónvarp ella lurta eftir útvarpi, fyri ta tí tey hava eina rás tendraða sum eitt brúkaragjald. Nýta fólk sjónvarpið í ein tíma ein dag, so gjalda tey fyri tað, og hava tey so hug at skifta yvir á Føroya Tele, so gjalda tey á sama hátt fyri tað, sigur Óli Breckmann.

– Vit halda tað er skeivt at fara at byggja ein almennan mastodont, ein útreiðslurisa risa, sum er avoldaður áðrenn hann er útbygdur. Vit vita jú ,at teir almennu umdrejningarin eru ikki so kvikir. At hava eitt forkromað alment sjónvarp hjá mentanaelituni, hjá tí mentanarliga úrvalsliðnum at hava háls og handsrætt yvir, tað ber slett ikki til. 70 milliónir krónur eru so nógvir pengar, at tað er nógmikið til at hava 200 fólk í starvi.

– Um sjónvarpið ikki klárar eitt betri inntøkugrundarlag við verandi skipan, har teir við lóg taka pengar fyri tað teir senda, so er tað fullkomiliga vilt, at teir skulu sleppa at taka tríggjar ferðir so nógvar pengar, eisini við lóg, frá hvørjum føroyskum húsarhaldi. Óansæð hvussu sjónvarpið fær pening frá ti almenna, so er talan um eykaskatt til borgaran og er tað meiningsleyst at verða tvangskravdur eftir verandi sjónvarpsgjaldi, so verður tað tríggjar ferðir meira meiningsleyst at verða kravdur fyri tað sum svarar til 70 milliónir, bara fyri at náa einum politikum málsetningi, sum sjálvandi eisini má kunna regulerast gjald verður regulerað, sigur hann.

– Vit í Fólkaflokkinum eru vanliga ógvuliga ivasamir um tiltøk, sum eru sterkt alment stuðlað, tí í slíkum førum hevur borgarin ikki ein møguleika fyri at verja seg. Eg haldi tað er sera umráðandi, at fólk merkja kostnaðin av einari og hvørjari tænastu beinleiðis og fólk tí kann taka støðu til út frá tí kostnað, sum tey halda vera í lagi ella ikki verða í lagi, um tey vilja halda fram við at brúka hesa tænastu ella ikki.

– Kamuflerar tú, dylir tú tann veruliga kostnaðin av SVF og nærum oysir ótaldar milliónir í stovnin, so er tað nærum ómøguligt at vita hvat í ein slík tænasta kostar, sigur Óli Breckmann.

Sjónvarpsstjórin bíðar eftir tingmonnum

SVF
Jústinus Leivsson Eidesgaard

Nýggi sjónvarpsstjórin, Mikkjal Helmsdal hevur gjørt sítt heimaarbeiði og hevur greinað út hvat tað kostar at náa endamálinum hjá Sjónvarpinum. Men um málsetningurin skal umdefinerast, so er tað letir hann politikkararnur um at avgera.

– Vit hava lagt upp fyri Mentamálaráðnum, at farið verður undir viðgerðina av endamálinum hjá Sjónvarpinum. Skulu vit senda tað sama sum í dag og alt skal verða føroyskt og føroyskað, so er prísurin 70 milliónir krónur. Hetta hava vit sett fram sum eina visión fyri at byrja eina samrøðu, sigur Mikkjal Helmsdal, sjónvarpsstjóri.

– Sum eg skilji, so ætlar mentamálaráðharrin at fara undir eina breiða viðgerð við flokkarnar á tingi um framtíðina hjá sjónvarpinum. Eg hevði ein fund við Mentamálaráðið hósdagin, har eg greiddi frá upplegginum og nú liggur bólturin hjá Mentamálaráðnum, sigur Mikkjal Helmsdal.

Mikkjal Helmsdal sjónvarpsstjóri

Mynd: Finnur Justinussen